# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Arnold Vegghamar í Galerie Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 31. august kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá listamanninum Arnold Vegghamar upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Talan er um eina 70 ára føðingardagsframsýning. Arnold Vegghamar hevur fylt 70 ár í ár. Hann er føddur í 1937, er útbúgvin silvur- og gullsmiður og býr á Viðareiði.

Í Føroyum hevur Arnold Vegghamar m.a. havt stakframsýningar við málningum í Listaskálanum og verið við á Várframsýningum. Í Danmark hevur hann m.a. sýnt fram í Sønderborg, Hirtshals og í Galleri Sct. Gertrud í Keypmannahavn.

Framsýningin verður opin til 13. september, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



*Ein framsýning hjá listamanninum Arnold Vegghamar letur upp í Galerie Focus fríggjadagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Arnhold Jespersen, Trongisvági**, andaðist í heiminum mánadagin 27. august, 93 ára gamal.

**Amon Djurhuus á Glyvrum** andaðist mánadagin 27. aug, 80 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Glyvra Kirkju mikudagin kl. 17. Jarðarferin verður úr Glyvra Kirkju hósdagin kl. 13. Tey í vilja minnast Amon kunna senda eina peningagávu á konto í Eik

**Eirikur Dam, Streymnes**, ættaður úr Kvívík, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 27. august, 58 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Dagurin**
**30. august. Benjamin.** Dagsins navn sipar til yngsta son Jákups við Rakul, (1. Mós. 35,18). Navnið merkir eydnusonur.

## Realkúlaflokkur í 1964

### Færøernes Mellem- og Realskole



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn frá 23. juli til 4. august 2007.

Realkúlaflokkur í 1964. **Aftasta rað f.v.:** Kári Davidsen, Anfríði Dam Jacobsen, Allan Brockie og Eivind Dalsgarð

**Miðraðið f.v.:** Krisjan Dahl, Jógvan Christiansen, Torfinn Hansen (Kanada), Herluf Lützen, og Bogi Davidsen

**Fremra rað f.v.:** Dagbjartur Johansen, Lis Djurhuus (Hammer), Kristina Abrahamsen (DK), Ása Sørensen (á Mýrini) og Olaf Johansen

*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*

## Hugleiðingar um Krossá í Kaldbak

*Krossá manga góða løtu mær hevur givið*
*summarkvøld við demningum og syngjandi fugli.*
*Ein ongantíð úr eygsjón av ommu og abba bleiv*
*Minnini tit góvu mær ei eg gloymi.*

*Fuglarnir, hundarnir, ketturnar, seyðurin*
*eitt samfelag við lívi og kærleika.*
*Søguna um Jesus pápa vit mangan fingu*
*tøkk eiga omma og abbi fyri tað.*

*Á kvøldarstund frásagnir í køkinum vóru*
*ein trygt kundi leggja seg við friði.*
*Áin ei úr mínum tonkum fer*
*Minini ei eg vil gloyma um Krossá.*

**Steinbjørn Viggosson Olsen**



Les Sosialin so ert tú við